Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 27.02.2020 kl. 17:30
Málnr.: 16/01208
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Óli M. Lassen, Beinta Klakstein, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
7/20	19/00481-8	Dagføring av ásetingunum fyri økispart (B14)
8/20	20/00058-6	Broyting av byggisamtykt – nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla
9/20	20/00191-2	Sundurbýti til felagseigindóm á Norðoyri
10/20	20/00177-3	Umsókn um marknaumskipan/samanlegging millum matr.nr. 797a og 806b
11/20	20/00121-3	Umsókn um marknaumskipan í felagsogn
12/20	16/00213-14	Heygavegur v.m. – framhald - *flyting millum kontir, fyrra viðgerð*
13/20	20/00213-1	Trivnaðarátak á Skúlatrød - *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*
14/20	20/00075-2	Stuðul til upplating av endurnýtsluhandli í Klaksvík – *flyting millum kontir, fyrra viðgerð*
15/20	20/00068-7	Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Til viðgerðar

7/20
19/00481-8 Dagføring av ásetingunum fyri økispart (B14)

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	26/20
2 Havna- og Vinnunevndin	18.02.2020	8/20
3 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	7/20

Frágreiðing um málið:
Í samband við útvegan av lendi til vinnulívið verður neyðugt at tillaga byggisamtykina, so hon loyvir virksemi, sum natúrliga knýtir seg til eina ídnaðarhavn.

Henda tillaging hevur ikki við sær, at tað ikki ber til at byggja bygning til avgreiðslu av ferðafólki í økinum, um tann tørvurin skuldi víst seg seinni.

Lógargrundarlag:
Býarskipanarlógin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Møguleiki verður fyri ávísari leiguinntøku til Klaksvíkar havn.

Tilmæli:
Mælt verður til at økisblaðið fyri økispartin verður broytt viðvíkjandi ábygging, so at ásetingin um, at "frá "Buchwald" og 170 m norðurum rampan kann bert vera bygt í samband við avgreiðslu av ferðafólki (tollhús)" verður strikað.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Gunvá við Keldu luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 11-02-2020.

Havna- og Vinnunevndin 18. februar 2020:
Ein meiriluti: TJL, SVJ, KEZ tekur undir við UBN 17-02-2020.
Ein minniluti: ASJ, mælir til at man heldur fast við verandi áseting.
Ein annar minniluti: HJS, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Gunvá við Keldu luttók ikki í viðgerðini av málinum.
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í HaVN 18. feb. 2020; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJS, KEZ, ÓML og BK), 2 atkvøður ímóti (ASJ og SOJ) og 2 blonkum atkvøðum (BJ og HJS).

8/20
20/00058-6 Broyting av byggisamtykt – nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	19.02.2020	K-5/20
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	22/20
3 Tekniska Nevnd	19.02.2020	15/20
4 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	8/20

Frágreiðing um málið:
Vísst verður til býráðssamtykt 06.02.2020 um at heimila fyrisitingini at arbeiða víðari við uppskoti um nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla, D41.



Nýtt D-øki.

Fyrisitingin skjýtur upp at áseta hesar ásetingar fyri nýggja D-økið, D41. Sí *Uppskot til økisáseting - D41*.

Lógargrundarlag:
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu.

Fíggjarligar avleiðingar:
Grundøkið (matr.nr. 1006ap) verður tikið av grundstykkjalistanum, tískil verður ongin søla. Grundøkið er mett til kr. 186.960,-.

Skjøl:
- *20/00058-7 - 3/20 Samtykt Klaksvíkar Býráð, 06.02.2020 Broyting av byggisamtykt - nýtt D-øki millum Hjalla/undir Grashjalla*
- *20/00058-08 - Uppskot til økisáseting - D41*

Tilmæli:
Tekniska fyrisiting mælir til, at fyriliggjandi uppskot av nýggjum økisparti D41 verður samtykt, so farast kann undir tilgongdina við almennari framløgu og góðkenning frá umhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 06-02-2020.

Ferðslunevndin 19. februar 2020:
Málið verið til kunningar.

Tekniska Nevnd 19. februar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá TN 19. feb. 2020 einmælt samtykt.

9/20
20/00191-2 Sundurbýti til felagseigindóm á Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	19/20
2 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	9/20

Frágreiðing um málið:
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til skriv frá neystaeigarum á Norðoyri, sum ætla at keypa matr.nr. 15a. (sí skriv dagf. 1.nov. 2019)
Allar iblandaðu neystaognirnar hava tinglýsta atgongd yvir umsókta lendi
Bæði neystaognir og matr.nr. 15a liggja í økisparti D36 (Grønt øki/neystaøki)

Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
-

Tilmæli:
Eftirsum umsóknin er frá øllum teimum, sum eiga tinglýsta atkomurættin, hevur Tekniska Fyrisiting ongar viðmerkingar til eigaraskiftið.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-02-2020.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá UBN 17. feb. 2020 einmælt samtykt.

10/20
20/00177-3 Umsókn um marknaumskipan/samanlegging millum matr.nr. 797a og 806b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	18/20
2 Tekniska Nevnd	19.02.2020	17/20
3 Fíggjarnevndin	25.02.2020	19/20
4 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	10/20

Frágreiðing um málið:
Í skrivi móttikið 3. februar 2020 verður søkt um loyvi til ummatrikulering millum omanfyri nevndu ognir undir Fossum.
Umsóknin raðfestir 4 møguleikar:

1. Søkt verður um samanlegging av lutum hansara niðanfyri ætlaða vegin undir Fossum
2. Søkt verður um tilsøgn til at byggja sethús og bilhús tvørtur um mark
3. Søkt verður um at flyta verandi mark millum lutirnar longur vestur, so byggjast kann sethús og bilhús við 2,5 m frá marki.
4. Søkt verður um at flyta verandi mark millum lutirnar longur vestur, so byggjast kann sethús við bilhúsi í mark

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
ad 1: Samanlegging av báðum lutunum er ikki í tráð við fyriliggjandi útstykkingarætlan fyri økið. Samanlegging ber í sær, at útstykkingin minkar við einum grundøki, og sannlíkt er, at onnur í økinum koma at seta sama krav.
ad 2: Byggireglurnar loyva ikki at bygt verður tvørtur um mark
ad 3: Kravd grundstykkjavídd er min. 300 m^2. Verður eftirverandi lendi av matr.nr. 806b niðanfyri vegin + millumøki móti ætlaða parkeringsøkinum minst 300 m^2, er hetta ein møguleiki, sum kann lata seg gera. Loysnin krevur eina regulering í útstykkingarætlanini, men varðveitir talið av grundøkjum
ad 4: Sama sum í 3. Byggireglurnar loyva bilhúsabygging í mark.



Lógargrundarlag:
Matrikullógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Fyri keyp av vegalendi fyri kr. 110,-/m^2: uml. kr. 35.000,-, fíggjast av *Byggibúning Bústaðir*.
Spurningurin um sjálva vegagerðina verður at viðgera undir raðfesting *Byggibúning Bústaðir*

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla marknamskipan millum matr.nr. 797d og 806b sambært uppskoti 3, og annars at taka upp samráðingar um yvirtøku av vegalendi sambært útstykkingarætlan.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-02-2020.

Tekniska Nevnd 19. februar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020.

Fíggjarnevndin 25. februar 2020:
Nevndin tekur undir við TN 19-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

11/20
20/00121-3 Umsókn um marknaumskipan í felagsogn

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	16/20
2 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	11/20

Frágreiðing um málið:

Umhvørvisstovan biður tann 20-01-2020 um kommununnar ummæli til, at eigararnir í felagseigindóminum matr.nr. 909a marknaumskipa sínámillum, soleiðis at matr.nr. 798 letur sín part til matr.nr. 820a.

Talan er um jarðarteig niðanfyri Eysturoyarveg sunnanfyri lendingina á Flesjum.
Byggisamtyktarliga ásetingin er :
D1 - Grønt øki.
Nýtsla: Náttúruøki. Støða verður tikin til neystabygging í hvørjum einstøkum føri (friðingarmyndugleikarnir)

<u>Lógargrundarlag:</u>
Matrikullógin

<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

<u>Tilmæli:</u>
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini, men av tí at lendið liggur framvið landsveg, krevst somuleiðis ummæli frá Landsverk.

<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:</u>
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-02-2020.

<u>Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:</u>
Tilmælið frá UBN 17. feb. 2020 einmælt samtykt.

<u>12/20</u>
<u>16/00213-14 Heygavegur v.m. – framhald – *flyting millum kontir, fyrra viðgerð*</u>

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	24/20
2 Tekniska Nevnd	19.02.2020	13/20
3 Fíggjarnevndin	25.02.2020	17/20

4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	27.02.2020	12/20
5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.03.2020	

Frágreiðing um málið:
Í 2016 bleiv hendan spillivatnsverkætlan (Heygavegur) boðin út og byrjað uppá. Byggifyritøkan Kanjon var lægst, og fóru teir undir arbeiðið. Verkætlanin fevndi um ca. 60 hús, og tilboðið ljóðaði uppá 6,3 mill. kr.
Tann sunnasti parturin av verkætlanini bleiv gjørdur, og kostaði 1,9 mill. kr., hetta er tann parturin, sum er litaður gulur á viðheftu tekning, *Við Másheygg/Heygavegur*.
Tað, sum er eftir at gera, er:

1. *Gerðagøta* (litað grønt), fyri ein mettan kostnað uppá 500.000 kr.
2. *Á Eiðinum* (litað blátt), mettur kostnaður 1,5 mill. kr., og
3. *Heygavegur* (litað ljósareytt), mettur kostnaður 2,4 mill. kr.

Í samband við at SEV er í ferð við at leggja kaðalar frá Ánavegnum til Norðoyatunnilin, leggja teir sínar kaðalar í niðaru síðu á Heygavegnum. Teir hava lagt suður til húsini Heygavegur nr. 39, har teir fyribils eru steðgaðir.
Sambært spillivatnsprojektinum so skulu regn- og spillivatnsleiðingarnar leggjast í ovaru síðu á vegnum, og ynskiligt hevði verið, at tað arbeiðið bleiv framt, áðrenn SEV fór víðari við sínum leiðingum eftir Heygavegi. Hetta fyri at gera tað meiri arbeiðsligt fyri byggifyritøkuna Kanjon.

Eitt so stórt inntriv á ein veg, sum omanfyri nevnt, reisir spurningin, um man ikki eigur at gera allan vegin av nýggjum? Tvs. kantsteinar í bæði borð frá Ziskagøtu til Gerðagøtu og síðani asfalt á bæði veg og gongubreyt. Vegur og gongubreyt treingja í øllum førum til eina uppraðfesting, og tað hevði fríðkað um hetta vegastrekkið, sum er nógv niðurslitið. Gongubreytin er ongantíð blivin asfalterað. Nevnast kann, at arbeiðið varð raðfest fyri fleiri árum síðani, men bleiv ongantíð framt.

Býráðið hevur sett av 2 mill. kr. á kontuni *Kloakkir Íløga* í ár, sum er nokk til at fremja kloakkarbeiðið á *Eiðinum*.
Heygavegurin tørvar 2,4 mill. kr., so um tað kloakkarbeiðið skal fremjast í ár, so krevst ein eykajáttan.

Á játtanini *Vegir Íløga* er ongin upphædd raðfest til Heygavegin.

Lógargrundarlag:
Kunngerð um reinsan av spillivatni.

Fíggjarligar avleiðingar:
Skal hetta arbeiðið fremjast, so má ein umraðfesting samtykkjast.

Tilmæli:
Tað er at fegnast um, at raðfestingar verða gjørdar, men her er eitt mál, har ein stovnur (SEV) fer ígjøgnum ein niðurslitnan veg, har bæði regn- og spillivatnsleiðingar mugu gerast av nýggjum, og har undirskrivaður sáttmáli fyriliggur við ein arbeiðstakara um hesar leiðingar, men arbeiðið kann ikki fremjast, tí ov lítið er avsett.
Tekniska fyrisiting mælir tí til eina umraðfesting, so henda verkætlan kann gerast liðug.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Nevndin mælir til at bíða við at fremja kloakkarbeiðið á Eiðinum og í staðin at umraðfesta avsettu upphæddina, 2 mió. kr., til verkætlanina á Heygavegnum. Harnæst mælir nevndin til at flyta 0,4 mio. kr. frá *Byggibúning, bústaðir* til *Kloakkir, íløga*.

Tekniska Nevnd 19. februar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020.

Fíggjarnevndin 25. februar 2020:
Nevndin tekur undir við TN 19-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

13/20
20/00213-1 Trivnaðarátak á Skúlatrød – *flyting millum kontur, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	18.02.2020	13/20
2 Fíggjarnevndin	25.02.2020	21/20
3 Klaksvíkar Býráð	27.02.2020	13/20
4 Klaksvíkar Býráð	26.03.2020	

Frágreiðing um málið:
Hóast børn, sum meginregla, trívast og mennast millum sínar javnaldrar, so umgongst ikki, at tað viðhvørt eru trupulleikar á hesum øki, sum vit vaksnu mugu hjálpa teimum við.

Eitt sjúkueyðkenni fyri henda mistrivnað er, at tað seinastu árini er íkomið eitt nýtt fyribrigdi, sum hevur fingið sítt egna málsliga heiti. Hetta er "skúlanoktan", har skúlanæmingar nokta at fara í skúla. Talan er tíbetur ikki um nakað stórt tal av næmingum, men lutfalsliga er talið ríkiliga stórt, tí millum fakpersónar, sum umsitingin samskiftir við, verður tosað um, at umleið 10 børn hoyra til hendan bólkin.

Ein aldursbólkur, har hesar avbjóðingar eru rættiliga aktuellar, er frá 4. til 6. skúlaflokk, og tí hevur kommunan – sum eina roynd at gera nakað ítøkiligt við hetta her í lokalsamfelagnum – í samstarvi við skúlan sett í verk eina minni verkætlan, har arbeitt verður miðvíst við øllum næmingunum í 4. flokkunum til tess at skapa betri trivnað og at beina burtur happing og eisini skúlanoktan. Umleið 70 skúlanæmingar eru partur av verkætlanini, har bæði tónleikur og sjónleikur verður brúktur sum amboð, og har tey enntá fara beinleiðis til verka og ringja heim eftir næmingi, sum ikki vil koma í skúla, fyri at vinna á hesum trupulleika.

Verkætlanarleiðarar eru Vivian Sjóðklett og Rógvi B. Dam, ið arbeiða free-lance innan hetta økið, og sum samstundis eisini royna somu verkætlan á einum skúla í Havn, upplýsa tey. Verkætlanin verður sjálvsagt framd við heimild frá skúlaleiðsluni og í samstarvi við lærarar hjá hesum somu børnum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019, ásetur í kapittul 1 um "*endamál fólkaskúlans*", í § 1, stk. 3, at "*fólkaskúlin ... skal búgva*

næmingarnar til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag. Undirvísing og gerandislív skúlans eiga at vera grundað á andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði".

§ 47, stk. 4, í somu lóg ásetur, at "*kommunustýrið hevur ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi og ásetur fíggjarkarmin fyri tann einstaka skúlan*", og í § 28, stk. 3, er ásett, at "*landskassin rindar læraraløn fyri undirvísing eftir 1. og 2. stk. eins og læraraløn annars. Kommunustýrið ber aðrar útreiðslur í sambandi við undirvísing eftir 1. stk.*"

Hetta trivnaðarátak, sum er fyri øll børn í málbólkinum og harvið almannagagnligt, er sostatt í tráð við lógarásetta endamál fólkaskúlans og gjaldsskyldur kommununnar sambært somu lóg.

Fíggjarligar avleiðingar:
Kostnaðurin av hesi verkætlan er samanlagt 40.000 kr., sum mælt verður til at fíggja við niðanfyri standandi flyting millum kontur:

Rakstrarstað og dimensión	Rakstrarstøð og kontunøvn	Verandi budget weblundin	At flyta millum kontur	Dagførd útgreining at skráseta
3261170030	**Barnaansing felags**			
146980	Keyp av vørum annars	50.000	-40.000	10.000
4232270010	**Skúlatrøð**			
147901	Sakkøn hjálp Tæn.keyp t.d. psykolog,lækna-& tannlæknahj	0	40.000	40.000
	NETTO ER TALAN UM ÚTREIÐSLUNEUTRALA BROYTING		**0**	

Tilmæli:

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 18. februar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 11-02-2020

Fíggjarnevndin 25. februar 2020:
Nevndin tekur undir við B&U 18-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

14/20
20/00075-2 Stuðul til upplating av endurnýtsluhandli í Klaksvík – *flyting millum kontir, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	21.01.2020	3/20
2 Fíggjarnevndin	04.02.2020	11/20
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	27.02.2020	14/20
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.03.2020	

Frágreiðing um málið:
Á kvinnudegnum, 8. mars, í fjør hittust Beinta Klakstein, trivnaðarnevndarforkvinna, og Hedvig Jóhansdóttir, stjóri í Dugna, sum tá spurdi, um Klaksvíkar kommuna kundi verða Dugna til hjálpar við at finna eini hóskandi hølir í Klaksvík til sølubúð hjá Dugna.

Her í norðurøkinum hevur Dugni frammanundan eina deild á Kambsdali, har verkstaður er saman við einum handli, og er ætlan stovnsins at halda fram við verkstaðnum og øðrum virksemi har, men mett verður, at handilin liggur munandi betur í Klaksvík.

Umvegis borgarstjóran heitti trivnaðarnevndarforkvinnan á umsitingina um at viðvirka til at finna eina góða loysn til Dugna í Klaksvík. Síðani hevur verið arbeitt við ymsum møguleikum, og nú er ein loysn funnin, sum leiðslan í Dugna er væl nøgd við.

Talan er um eitt leigumál í veghæddini í bygninginum hjá Soli Deo Gloria, har Kiosk 700 var til fyri stuttum. Ein leiguavtala verður nú gjørd millum Soli Deo Gloria sum eigara og Dugna sum leigara.

Í sambandi við hesa víðkan hava landsstýri og løgting játtað Dugna eina meirjáttan til at seta fólk í starv og til leigukostnaðin, sum ger tað møguligt hjá stovninum at lata upp hesa deildina í Klaksvík.

Viðfest hesum tilmæli er skriv frá Dugna, har tað framgongur, at stovnurin hevur tørv á nakað av peningi til at etablera seg í Klaksvík. Frammanundan hevur umsitingin, vegna Dugna, samskift við grannakommunurnar um hetta, og hava allar givið tilsøgn um niðanfyri nevndu stuðulsupphæddir í 2020:

Fugloyar kommuna	10.000 kr.
Viðareiðis kommuna	15.000 kr.
Hvannasunds kommuna	15.000 kr.
Kunoyar kommuna	10.000 kr.
Tvs. samanlagdur stuðul	**50.000 kr.**

Umsitingin hevur somuleiðis samskift við borgarstjóran og trivnaðarnevndarforkvinnuna um møguleikan fyri einum tilsvarandi stuðuli frá Klaksvíkar kommunu til Dugna á 50.000 kr., soleiðis at tann samlaði kommunali stuðulin til Dugna í 2020 verður 100.000 kr.

Lógargrundarlag:
Talan er um virksemi, sum verður bjóðað borgarum í málbólkinum á einum javnbjóðis grundarlag, og sum á tann hátt kemur borgarum í kommununi tilgóðar, og tí er talan um stuðul til almannagagnligt virksemi, sum eisini aðrar kommunur stuðla.

Fíggjarligar avleiðingar:
Um hetta tilmæli fær undirtøku, leggur umsitingin upp til, at hesin stuðul verður fíggjaður av niðanfyri nevndu rakstrarstøðum:

Rakstrarstaðnr.	**Rakstrarstað**	**Kontunr.**	**Kontunavn**	**Upphædd**
02211270030	Ymiskur stuðul almanna/heilsu	549000	Annar stuðul o.a.	25.000 kr.

01111470048	Umsiting annað	142000	Umboðan	25.000 kr.
				50.000 kr.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt til at stuðla Dugna við samanlagt 50.000 kr. í sambandi við upplatingina av endurnýtsluhandli í Klaksvík.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. januar 2020:
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 14-01-2020.

Fíggjarnevndin 4. februar 2020:
Nevndin tekur undir við B&U 21-01-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælið frá FíN 4. feb. 2020 einmælt samtykt.

15/20
20/00068-7 Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	17.02.2020	30/20
2 Havna- og Vinnunevndin	18.02.2020	11/20
3 Tekniska Nevnd	19.02.2020	20/20
4 Mentanarnevndin	18.02.2020	18/20
5 Fíggjarnevndin	25.02.2020	16/20
6 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	27.02.2020	15/20
7 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.03.2020	

Frágreiðing um málið:
Málið um møguligan nýggjan atkomuveg til eyrmóttøkuna á Bumshamri var til viðgerðar í viðkomandi nevndum kommununnar í januar 2020, har hesar samtyktir eru gjørdar:

- UBN hevði málið til kunningar.
- HaVN tók undir við málinum og heitti á umsitingina um at arbeiða víðari við málinum, fyri síðani at legga málið fyri aftur við einari kostnaðarætlan og neyðugum loyvum.
- FeN tók undir við viðtøkuni hjá HaVN.
- TN tók undir við viðtøkunum hjá HaVN og FeN.
- Fíggjarnevndin tók undir við HaVN, FeN og TN.

Brot úr frágreiðingini í januar, og dagføringar:
Í samband við eitt sethúsagrundøki undir Klakki (mál nr. 19/00499) er málið um ein nýggjan atkomuveg til økið undir Klakki samtykt av viðkomandi nevndum og býráði í oktober 2019. Arbeiðið er ikki sett í verk, tí UBN/TN skulu ávísa, hvussu vegaarbeiðið skal fíggjast. Lagt varð upp til, at greiða skuldi fáast á fíggingini til nevndarumfarið, sum verður í februar 2020.

Kort av nýggja vegnum:

Umrøtt er, um nevndi vegur eisini kann geva møguleika fyri einari nýggjari atkomu til eyr-mótøkuna á Bumshamri. Um hetta verður gjørt, so fer nýggi vegurin at gera tað møguligt at økja um mongdina av eyri, sum kann leggjast í gamla grótbrotið, tí tá verður møguleiki fyri at fylla longur oman í brotið. Annar fyrimunur við hesari ætlanini er eisini, at tað verður nógv høgligari at sleppa av við eyrin, og ikki verður neyðugt at hava maskinu á staðnum alla tíðina, sum tekur í móti.

Málið krevur, at ein vegur uppá einar 150 metrar skal gravast ígjøgnum og planerast, so koyrandi verður frá nýggja atkomuvegnum (mál nr. 19/00499) til gamla vegin, sum liggur við tromina á gamla grótbrotinum.

Viðvíkjandi eyr-móttøkuni er eisini galdandi, at verandi grótbyrging - eftir øllum at døma - ikki kann flytast, sum ætlað. Tí verður neyðugt at útvega meira grót til eina nýggja grótbyrging, sum skal liggja tvørtur um munnan á gamla grótbrotinum. Nevnda grótbyrging kann helst eisini nýtast sum ein saman-bindingarvegur niðanfyri uppfylta økið, og fer at gera tað møguligt, framhaldandi at kunnu koyra niðan á tað uppfylta økið.
Roknað verður við, at neyðuga grótið kann takast úr gamla grótbrotinum. Kostnaður av at spreingja og leggja grótið fyri munnan á gamla grótbrotinum er mettur til 200 tkr. Verkfrøðingurin hevur mett kostnaðin av nevnda vegi til uml. 1,0 mió. kr. Ætlanin tilsamans fer sostatt at kosta 1,2 mió. kr.

Kommunan eigur ikki lendið, og tí er neyðugt við einari avtalu við eigaran av lendinum. Kommunan hevur tosað við umboð fyri eigaran, og tekningar og frágreiðing eru sendar eigaranum.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eingin peningur er avsettur beinleiðis til málið.

Tilmæli:
Viðkomandi nevndir og býráð eru vitandi um avbjóðingina í samband við móttøku av eyri. Nøgdirnar um árið seinastu árini, hava verið munandi størri, enn at tað sum kommunan vanliga tekur í móti.

Peningur er ikki avsettur beinleiðis til eina møguliga loysn av málinum. Tí verður heitt á viðkomandi nevndir og Býráð um at taka málið upp til eina serstaka viðgerð.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:
Nevndin tekur undir við málinum og játtar 0,3 mió. kr. til verkætlanina av *Byggibúning, bústaðir*.

Mentanarnevndin 18. februar 2020:
Nevndin tekur undir við málinum og játtar kr. 300.000,- til verkætlanina av *Ítróttarøkið, Íløgur (Rennibreytin).*
Havandi í huga at økið skal brúkast til skjótibreyt, heita vit á umsitingina at taka atlit til hvussu avgrevsturin verður lagdur.

Havna- og Vinnunevndin 18. februar 2020:
Nevndin tekur undir við málinum og játtar kr. 300.000,- til verkætlanina av *Byggibúning, ídnaðarøkir (Undir Hamri).*

Tekniska Nevnd 19. februar 2020:
Nevndin tekur undir við málinum og játtar 300 tkr. av kontuni *Vegir, íløgur (tøkt til aðrar vegagerðir)*

Fíggjarnevndin 25. februar 2020:
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020, MeN og HaVN 18-02-2020 og TN 19-02-2020.

Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:
Tilmælini frá UBN 17. feb. 2020, MeN og HaVN 18. feb. 2020, TN 19. feb. 2020 og FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.